# Nærum øll halda jól í Singapore

Í Singapore eru Jólini almennir frídagar. Og ta› hugtakandi er, at nærum øll taka lut í hátí›arhaldinum, kristin og ikki-kristin. Tí alment eru bara 14% av íbúgvunum kristin. Sum í so nógvum ø›rum londum, so er talan um eina boom-tí› hjá teimum, sum eru í handilsvinnuni. Ta› er eisini á Jólum, at starvsfólk fáa teirra ársbonus uppá lønina. Alt handilsøki, so sum Orchard Road og Marina Centre øki er ovurpr‡dd vi› litríkum ljósum. Og hetta er galdandi, líka frá mi›jum november, og til N‡ggjárs. Seinastu árini hevur ein vælger›ar-felagsskapur, sum nevnist Celebrating Christmas in Singapore Ltd, sum samstarvar vi› National Council of Churches of Singapore, skipa› fyri tiltakinum “Celebrating Christmas in Singapore”. Tiltaki› umfatar felagssang vi› jólasangum, konsertir og skrú›gongir. Hetta fer alt fram á Orchard Road, sum er ein av kendastu handilsgøtunum í Singapore. Tá ta› kemur til jólamat hava tey tiki› si›in upp eftir amerikumonnum, og eta tey kalkun jólaaftan.






















